ítróttur

Nr. 242 • fríggjadagur • 15. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-Kyndil 20-23 (10-10)

So vann Kyndil á teimum bláu

Eftir at teir seks landskappingardystir á rað hava verið við undirlutan móti grannunum, eydnðist Kyndli mikukvøldið at vinna á Neistanum, og sigurin var fult uppiborin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Neyvan man ta› vera hent fyrr í søguni hjá teimum bá›um havnarfeløgunum, at Kyndil seks fer›ir á ra› hevur veri› vi› undirlutan í grannauppger›ini í bestu mansdeildini.

Solei›is var stø›an tó undan dystinum mikukvøldi›, og einki er at ivast í, at hetta var naka›, sum leikararnir á kyndilsli›num ætla›u at gera sítt til fyri at for›a. At ta› harumframt stó›u sera t‡dningarmikil stig upp á spæl, man ikki hava gjørt strí›sviljan hjá Kyndli minni, og hetta tóktist eisini sjónligt fyrstu løtuna av dystinum.

Bert hepni› resta›i

Kyndil var nevnliga klárt betra li›i› á lei› fyrsta korteri›.

Verjan rigga›i væl. Skjótingarnar millum leikararnir vór›u framdar somiki› skjótt og væl, at ta› at kalla var ógjørligt hjá Neistanum at spæla seg ígjøgnum. Ta› einu fer›ina vór›u teir enntá dømdir fyri nøl vi› einum manni í yvirtali. Blokkarnir sótu eisini har teir skuldu, og hev›i t‡dningarmesti parturin av álopsspælinum, nevnliga skotroyndirnar, rigga› eins væl, so hev›i neistali›i› ivaleyst ver›i› køvt longu í byrjanini av dystinum.

At ta› kortini ikki gekk solei›is, komst serliga av tveimum fyribrigdum. Anna› av hesum var, at hepni so at siga als ikki var vi› kyndilsli›num, tá skjótast skuldi. Í øllum førum man innarasí›an av stólpunum í málinum á Hálsi vera naka› tynri nú eftir dystin, enn hon var undan dystinum.

Hitt var, at Ørvur Heimbø í neistamálinum stó› ein sera gó›an dyst, har hann fleiri fer›ir bjarga›i skotum frá at kalla fríum mótleikarum, tá Kyndil fer› eftir fer› vi› skjótum álopsspæli fór ígjøgnum neistaverjuna.

Fullu aftur á

Sostatt eydna›ist onganti› veruliga hjá Kyndli at sleppa leysir hesa fyrstu løtuna. Naka› inn í dystin fingu teir tó opna nøkur mál ni›ur til Neistan, men ísta›in fyri at halda fast um og útb‡ggja hesa lei›slu, fóru teir brádliga at taka sær av løttum.

Verjan tóktist als ikki nóg sterk longur, og neistali›i› slapp nú væl longur inn at skjóta, og fram móti endanum kundi Áki Mørk gera sær dælt av hesum tríggjar fer›ir á ra›, solei›is at talan gjørdist um javnleik.

Tamt í seinna

Ta› vísir seg ofta, at hevur eitt li› fyrst sett fer›ina ni›ur, so er ógvuliga torført at vinda hana upp aftur, og solei›is var eisini vi› Kyndli mikukvøldi›.

Teir vóru tó eisini vi› yvirlutan allan seinna hálvleik, men avriki› gjørdist ongantí› so sannførandi, sum fyrsta korteri› av dystinum.

Tí›liga í seinna hálvleiki hev›i Neistin millum anna› tvær útvísingar á ra›, harav tann hjá Jákup Sverra væl kundi veri› beinlei›is reytt, men heldur ikki tá eydna›ist Kyndli veruliga at fara avsta›.

Teir fingu tó økt munin upp í eini fimm mál, tá hann var størstur, og tá tóktist ta› eisini greitt, at dysturin mundi hava funni› sína avger›. Neistin fekk minka› naka› um munin aftur, men spenning fingu teir ikki í dystin. Heldur ikki hóast teir at enda royndu at skifta málverjan vi› útileikara, so teir í álopsstø›u roynda seg vi› sjey móti seks.

Jónleif var framúr

Sæ› burtur frá fyrsta korterinum, tá kyndilsli›i› virka›i sum ein væl skipa› eind, so mundi ta› serliga vera Jónleif Sólsker, sum skara›i framúr mikukvøldi›.

Royndi neistali›i› at koma út á vøllin at verja, gav hann í fleiri førum dømi um, hví hann ver›ur mettur millum bestu spælskipararnar í landinum, tá hann nærum sletti bóltin inn um verjuna til fríar vi›leikarar. Í seinna hálvleiki roynda Neistin at for›a fyri hesum, vi› at verja longur inni, men hetta førdi vi› sær, at Jónleif slapp nærri málinum, og tá skotini so fullu, var líti› at gera hjá Ørvi.

Sami Ørvur mundi annars vera besti ma›ur á neistali›num hetta kvøldi›. Fyri uttan hann, kundi væl veri›, at tapi› hjá teimum bláu hev›i veri› nógv størri enn tr‡ mál.

Tá Neistin í seinna hálvleiki dró verjuna inneftir, slapp Jónleif Sólsker rættiliga fram at vi› skotroyndum sínum

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Neistin: Jacob Jonsson 6, Jákup Sverri Kass 5, Ári Rouch 4(1), Áki Mørk 4, Helgi Justinussen 1
Kyndil: Jónleif Sólsker 9(2), Hans Áki Dahl Christiansen 4(1), Rúni Poulsen 3, Bjarni Wardum 3, Heini Bendtsen 3, Janus Einar Sørensen 1
Brotskøst: Neistin 3, Kyndil 4
Útvísingar: Neistin 5, Kyndil 5
Dómarar úr Tjaldur: Kári Hansen og Dánjal Hansen. Tóktust til tí›ir ókonsentrera›ir í dømingini, og høvdu tí fleiri skeivar metingar. Roynda hinvegin at leggja eina grei›a linju, sum teir so nøkunlunda megna›u at halda.

Kyndil fær ikki vart steypið

Tvær fjórðingsfinalur í Coca-Cola kappingini hjá kvinnum vórðu leiktar mikukvøldið, og meðan stórur spenningur var í dystinum í Havn, var talan um eina hálva sensatión á Skála

COCA-COLA KAPPINGIN
Jákup Mørk

Av teimum bá›um hálvfinalunum, sum vóru á skránni mikukvøldi›, mundu tey flestu rokna vi›, at spenningurin helst fór at vera í Havn, har Neistin og Kyndil hittust. Hin dysturin var á Skála, har StÍF, sum dagliga spælir í a›ru deild, skuldi taka ímóti VÍF.

Hálv sensatión

Ta› skuldi tó vísa seg, at VÍF fekk nógv størri trupulleikar av StÍF, enn tær sjálvar munnu br‡ggja seg um.

Í hálvleikinum hev›i StÍF nevnliga eina eitt máls lei›slu, og fyrstu tíggju minuttirnar av seinna hálvleiki bendi einki á, at tær fóru at sleppa hesi. Ta› var ikki fyrr enn VÍF fór undir at mansverja tær bá›ar útlendsku leikararnar hjá STÍF, at munur kom í, solei›is at talan at enda gjørdist um ein grei›an sigur.

Endaliga stø›an gjørdist 22-14 til VÍF, eftir at StÍF hev›iført 9-8 í hálvleikinum. Hjá heimali›num skutu Alina Olaru og Ileana Manulescu f‡ra mál hvør, me›an Sóley› Mikkelsen skeyt átta mál fyri gestirnar.

Brotskøst á Hálsi

Í grannauppger›ini á Hálsi skuldu brotskøst til, á›renn naka› sum helst var avgjørt.

Endaliga stø›an gjørdist, at Neistin vann dystin 29-27. Upprunaligi dysturin enda›i 21-21 (12-9), og tá umdysurin kasta›i f‡ra mál av sær til hvørt av li›unum, gjørdist ney›ugt vi› brotskøstum. Her misn‡tti Kyndil tey bæ›i fyrstu køstini, og tá Neistin so skora›i upp á síni, gjørdust ta› at enda tær, sum fóru avsta› vi› sigrinum.

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 15. desember til hósdagin 21. desember



Svartur sannleiki – Ingálvur av Reyni

svf Mikukvøldið kl. 20.00

Hetta er ein filmur um listamannin, Ingálv av Reyni, og stríð hansara fyri sannari og erligari list.

Hann er mildur móti øðrum, men harður móti sær sjálvum. Altíð á veg fram, leitandi eftir nýggjum møguleikum og nýggjum leiðum.

Ingálvur er sjálvur frásøgumaður, tá vit ferðast í listaheimi hansara. Filmurin er ikki ævisøgan hjá listamanninum, men heldur ein persónslýsing, har roynt verður at lýsa nakrar sermerktar síður av listamanninum.

Filmurin varð fyrstu ferð sendur 25. apríl 1999, men hann verður endursendur í sambandi við, at Ingálvur fekk Mentanarvirðisløn Landsins fyri stuttum.

Jólahugni av ymsum slag

Onkur spurdi meg, um eg hevði hoyrt hina ræðuligu lýsingina: Álmanakkin, álmanakkin... Jú, og eg haldi eisini, at hon er fjákut - men hon virkar! Øll hava heft seg við hana. Summi ting eru so strævin, at eg má flenna at teimum. Hendan lýsingin er ein av teimum. Nógvar av hinum lýsingunum eru so keðiligar og onkisigandi, at tær fara inn gjøgnum annað oyrað og út gjøgnum hitt. Fyrr og nú lýsingar, nógv bíligast, tilboð uppá margarin. Her eru vit ikki komin serliga langt í Føroyum.

Tað frøir meg at hoyra, at fólk gera annað til jóla enn at renna runt og keypa jólagávur og stressa seg sjálvi. Hóast stutt er millum lýsingarnar og nógv verður fokuserað uppá alt tað herliga, vit kunnu keypa fyri at verða lukkulig, so eru tíbetur eisini aðrir mátar at hugna sær til jóla. Í sendingini úr Klaksvík sunnukvøldið tosaðu tey við Hannu Thøgersen, sum greiddi frá, hvussu tey hava jólahald fyri børnunum í Mylnuhúsinum. Her verða foreldrini tikin við uppá ráð, og dentur verður lagdur á at hugna sær, heldur enn at skula ígjøgnum eina rúgvu av ritualum.

Vítt til veggja

Guðstænastan sunnumorgunin var eitt forkunnugt upplivilsi. Kirkjan fær ofta skotið í skógvarnar at vera keðilig, ótíðarhóskandi og als ikki eitt áhugavert stað fyri børn. Tað haldi eg varð mótprógvað í Kollafjarðar kirkju 1. sunnudag í advent. Her vóru tað børnini, sum høvdu høvuðsleiklutin. Tey sluppu at lesa upp, prestur tosaði beinleiðis til teirra og at enda søgdu Vár og Páll teimum søgu. Eg haldi ikki, eg fyrr havi hoyrt børn flenna hart í kirkjuni. Tað er ótrúliga positivt í mínari verð.

SVF sendi frá konsertini Túsund tónar úr Vesturkirkjuni, sum eisini var eitt áhugavert tiltak innan kirkjugátt. Í sambandi við 1000 ára kristnihaldið hava nógv tiltøk verið, og hetta var eitt av teimum best egnaðu at senda í hvørt hús. Tað eru ymsar meiningar um slíkar konsertir, serliga tá tær eru innan kirkjugátt. Eg haldi, tað var gott, at SVF valdi at senda frá hesum, so øll fingu møguleikan at síggja og hoyra brot úr okkara fjølbroyttu kirkjutónleikarasøgu.

Jallajól og Jóla(f)res

Jallajól hava ikki fangað heilt so væl her í húsinum, sum eg hevði væntað. Kanska er tað tí, at vit hava so nógv annað at hugsa um í løtuni. Sendingin er annars væl gjørd og hevur eitt sindur av hvørjum við til størri og smærri børn. Sjálv haldi eg Jólafres vera í so rokut, minnir ov nógv um MTV. Smágentur, sum ganga mótasýning, meðan klippt verður skjótt millum myndirnar. Mær hevði dámt betur, um ferðin varð sett eitt sindur niður. Samanumtikið er sendingin tó góð. SVF raðfestir barnasendingarnar ovarlaga, og tað skulu tey eiga rós fyri.

I Wanda

Hesa vikuna havi eg mest sæð útlendskt tilfar, ella rættari enskar sendingar í SVF. Barnaby ovasti, Øvundsjúkar systrar og ikki minst A Fish called Wanda. Tað er nakað heilt serligt við enskum sendirøðum og filmum. Tónin er heilt øðrvísi, skemtiligur og sjálvkritiskur, enn í líknandi amerikanskum sendingum. Málið er fjølbroyttari, úttalan penari og nógv meira liggur millum reglurnar. Onglendingar duga kynstrið at siga nógv við fáum orðum. Hetta hevur sjálvandi eisini avmarkingar við sær. Alt skal verða so rætt og pent í Onglandi, ella sum John Cleese segði í A Fish called Wanda: "Do you have any idea, what it's like to be English?"

Ummæli av ummælum

Carl Jóhan Jensen tekur ofta rívan til sum ummælari. Helst hevur hann rætt í nógvum av tí, hann sigur, men hetta er ikki ein stílur, sum er eyðkendur í Føroyum. Sjálv kundi eg hugsað mær fleiri verulig ummælir av bókum og øðrum, tí eg haldi at allar viðmerkingar, eisini sera atfinningarsamar, eru betri enn ongar. Torir ongin at siga, at ein bók er ov vánalig, verður rithøvundurin neyvan betri næstu ferð. Tað kunnu vit ikki bjóða fólki,

Annika Sølvará ummælir:

sum hava brúkt nógva tíð og orku uppá eitt verk. Í Bókajólum mánakvøldið haldi eg Carl Jóhan fekk drigið eitt sera týdningarmikið evni fram, sum allir ummælarar og tey sum verða ummæld áttu at lagt sær í geyma: Tað manglar ofta ein hjálpandi hond, ein ráðgevi av onkrum slag, áðrenn bøkur (og sendingar) koma út. Nógv av tí, sum ummælarar peika á, kundi verið sloppið undan, høvdu kritisk eygu runnið tilfarið ígjøgnum eina seinastu ferð áðrenn útgávu og komið við konstruktivum viðmerkingum. Hinvegin er tað sjálvandi eisini rætturin hjá rithøvundanum (programfólkinum) ikki at taka ráðini til sín. Sum Jóhan Hendrik Winther Poulsen segði um málrøkt, so ræður um at halda á við tí mennandi arbeiðinum, hóast alt ikki fellur í góða jørð. Okkurt taka fólk til sín og annað ikki. Nakað skal verða eftir at verða ósamd um eisini. Tíbetur, annars vóru vit fleiri, sum vóru arbeiðsleys.

Okkara Kokkar

svf Mánakvøldið kl. 20.30

Hvat nú?

Mánadagin kl. 17.05

Halløj i flåden

3 Mánakvøldið kl. 19.00

Significant Others



3 Týskvøldið kl. 19.00